# Við veðrum í Settilsgjógv



*Viðingar hava gjørt ein kassa at flyta seyð í. Her eru Ludvík, Bjarni og Ísak í ferð við at seta kassan saman*

*Mynd: Jógvan Nybo*



*Ikki kann sigast annað enn, at hetta er fittligari flutningur hjá seyðinum*

*Mynd: Jógvan Nybo*



*Kassin verður eisini nýttur til at flyta fólk í. Her fara Ólavur og Jóhannes um 90 metur breiðu gjónna*

*Mynd: Jógvan Nybo*

**Leygarnáttina vóru viðingar í Settilsgjógv við veðrum. Fyri at lætta um flutningin av seyðinum, hava menn gjørt ein kassa og ein rennistrong, sum gongur tvørtur um eina 90 metur breiða gjógv**

FRÍTÍÐ OG NÁTTÚRA

*Rúna Sivertsen*

Settilsgjógv er eitt av mongu fitilendunum norðanfyri á Viðoynni.

Fyri mongum árum síðani leyp Háenni, soleiðis at ikki slapst tann vegin, ið menn fyrr vóru vanir at ganga. Í fleiri ár hevði tí eingin seyð í Settilsgjógv.

Seinni funnu menn ein annan gongdan veg, so farast kundi í Settilsgjógv við veðrum. Hesin vegurin var ógvuliga tungur at ganga, og neyðugt var við nógvum monnum, um farast skuldi.

– Ofta varð tosað um at gera tað lættari atkomiligt, og fyri tveimum árum síðani vóru vit nakrir, sum tóku okkum saman og gjørdu rennistrong og ein kassa at flyta seyðin í, sigur Jógvan Nybo av Viðareiði.

### Betur fyri seyðin

Jógvan sigur, at hetta hevur gjørt arbeiðið nógv lættari, og at tað nú stórt sæð er møguligt at leiða seyðin heilt til kassan. Fyri seyðin er hetta sjálvsagt ein stórur bati, sigur hann.

– Vit hava lagt alstóran dent á at gera rennistrongin so tryggan, sum tilber, og hava vit bara brúkt nýggja útgerð til hetta, sigur Jógvan.

Økið, har seyðurin gongur, er nú víðkað, soleiðis at nú er pláss fyri fleiri veðrum enn áður.

– Hesaferð sleptu vit 11 veðrum, sigur hann.

Á Viðareiði verða øll fitilendini gagnnýtt til fulnar, og áhugin er stórur.

– Sjálvur meti eg tað hava stóran týdning fyri bygdasamfelagið, at hesin aldargamli siður verður varðveittur. Ikki minst er gott at koma burtur úr strongda gerandisdegnum og hava okkurt annað at koma saman um, sigur Jógvan.

Um heystarnar verður nógv tosað um, hvussu nógv veðrarnir í teimum ymisku fitilendunum viga, og ikki er sørt, at ein ávís kapping er millum menn um vektina á veðrunum, sigur Jógvan Nybo at enda.

Bilar

Nr. 110 • hósdagur • 13. juni 2002 • 76. árg.



*Síðan 1975 hevur Erik Vaaben selt yvir 30 Caroliner upprættarabeinkir í Føroyum*

# Erik Vaaben – vitjað í Føroyum seinastu 30 árini



*Erik Vaaben kom fyrstu ferð til Føroya í 1970. Hetta var í sambandi við, at hann setti upp útgerð til nýggja bilverkstaðin hjá Wenzel Petersen við Oyggjarvegin*

**Ein av mongu donsku ferðandi umboðsmonnunum í Føroyum, er Erik Vaaben, ið javnan hevur vitjað her tey seinast 30 árini. Vit hittu hann á bilasøluni, Bilfríðkan, áðrenn hann fór av landinum seinasta hósdag**

UMBOÐSMAÐUR

*Magnus Gunnarsson*

Erik Vaaben er ein kendur persónur innan bilvinnugreinina í Danmark og í Føroyum. Hann er føddur í 1936, er útbúgvin bilmekanikari og bilelektrikari, og býr í Viby á Sælandi.

Fyrstu ferð hann kom til Føroyar var í 1970, tá Hjalgrím Hentze, táverandi stjórin hjá P/F Wenzel Petersen, keypti útgerð til nýggja bilverkstaðin, teir tá lótu byggja við Oyggjarvegin. Erik Vaaben varð árið fyri, í 1969, settur í starv sum framleiðsluleiðari hjá fyritøkuni, E. Busch Møller, sum seldu alla ta nýggjastu útgerðina til bilverkstøð, so sum dekkmaskinur, balanseringsmaskinur, sporitól og motortestarar. Erik Vaaben setti øll hesi tólini upp á bilverkstaðinum hjá Wenzel Petersen.



*Erik Vaaben, ið er ein sera dámligur og fyrikomandi maður, var eitt tíðarskeið lærari á tekniska skúlanum í Roskilde. Hann sigur seg at hava lært nógv av føroyingum*

Erik Vaaben sigur, at tað var ikki so lætt at koma kring oyggjarnar tá í tíðini. Ongi vegskeltir vóru, vegirnir vóru vánaligir og teir máttu læra seg at halda av fyri mótgangangandi ferðslu, við at koyra inn á víkiplássini. Bilurin, teir høvdu við sær, mátti hivast umborð á strandfaraskipini, tá teir skuldu til Sandoyar, Vágar, Suðuroyar, Eysturoynna ella til Klaksvíkar. Hann má viðganga at broytingin í infrastrukturinum hevur verið ómetaliga stór hesi 30 árini hann hevur ferðast her.

### Fyrsti upprættarabonkurin í 1975

Hesa tíðina er eisini ein stór menning farin fram á bilverkstøðunum í Føroyum. Tá ein bilur, tá í tíðini, fekk ein so stóran skaða at ramman boygnaði og bilurin bleiv skeivur, mátti hann sendast til Danmarkar at umvæla, tí ongin upprættarabonkur var í landinum. Erik minnist at fyrsti Caroliner upprættarabonkurin bleiv settur upp á bilverkstaðinum hjá Bjarna Eliasen í Fuglafirði í 1975. Tað at upprættingarbeinkir nú blivu settir upp í Føroyum var einki minni enn ein kollvelting innan upprætting og lakkering av bilum, tí nú kundu allar umvælingarnar verða gjørdar her í landinum. Tryggingarsambandið hevði eisini stóran áhuga í hesi menning.

Í 1977 stovnar Erik saman við einum øðrum fyritøkuna, Vaaben & Clemensen ið m.a. seldi svensku Caroliner upprættaraútgerðina. Í 1980 keypir Erik sjálvur fyritøkuna, ið fekk navnið Erik Vaaben Teknik

Caroliner í Svøríki yvirtóku í 1986 donsku H.P.A. fyritøkuna, ið m.a. gjørdu bremsutestarar og sporitól til bilar. Tá kom Erik at starvast hjá teimum. Síðan 1994 hevur hann aftur havt sína egnu fyritøku, Erik Vaaben Teknik. Øll hesi árini hevur hann javnan verið í Føroyum, og hevur hann nógv vinfólk her. Hann sigur at hann hevur lært føroyingar í bilvinnugreinini nakað innan sítt arbeiðsøki, men hann sanniliga eisini lært nógv av teimum.